# Nýggja Norröna flotað í Lübeck

NÝTT SKIP
*Jan Müller úr Lübeck*



Seinnapartin leygardagin varð nýggja Norrøna flotað í týska býnum Lübeck. Umleið 100 føroyingar umframt hópurin av innbodnum úr útlandinum, vórðu bodnir til hátíðarhaldið, sum fór fram í allar besta summarveðri. Ikki færri enn tríggir ráðharrar vóru við til hesa stóru løtu, tá tey umleið 70%, sum eru liðug av nýggja skipinum, fóru av bakkastokki, tveir íslendskir og einum føroyskur. Tað var Martha Hammer, kona Óla Hammer, stjóra í Smyril Line, sum doypti og navngav skipið, Norröna. Umframt umboð fyri skipasmiðjuna Flender Werft hildu nevndarformaðurin Tórmóður Djurhuus og stjórin Óli Hammer, røður, har teir takkaðu øllum, sum hava verið við til at gera hesa verkætlan til veruleika.

Nýggja Norröna verður liðug í mars næsta ár og latin eigarunum 20 mars. Óli Hammer er sera fegin, nú hann eygleiðir nýggjasta verk sítt. Hann sigur, at hetta hevði ongantíð verið veruleiki uttan tey mongu fólkini, sum hava trúð uppá og arbeitt við verkætlanini. Hann heldur avgjørt, at tørvur er á einum nýggjum skipi og metir nýggju Norrönu at fáa alstóran týdning fyri menningina av føroysku ferðavinnuni. At íslendingar senda ikki færri enn tveir ráðharrar til hátíðarhaldið, vinnumálaráðharran og samferðsluráðharra heldur hann vísir, hvussu stóran dent íslendingar leggja á hetta skipið og ferðasambandið, sum Smyril Line hevur bygt upp.

Føroyski landsstýrismaðurin, ið var við til hátíðarhaldið, var Bjarni Djurholm, sum er sera fegin um nýggja skipið.





*Nýggja Norröna verður liðug í mars næsta ár og latin eigarunum 20 mars. Óli Hammer er sera fegin, nú hann eygleiðir nýggjasta verk sítt*

# Eitt nýtt tíðarskeið byrjað í ferðavinnuni

**Fyri pionerarnar, sum í 1975 síðani vórðu við til at keypa Mortan Mols, seinni Smyril, má hetta vera eitt ótrúlig kensla av vera við til sjósetingina av nýggju Norrønu 27 ár seinni sigur Heri Niclasssen, stjóri í Ferðaráðnum. Hann var hjástæddur, tá nýggja Norrøna fór at bakkastokki í Týskaland leygardagin**

FERÐAVINNA
*Jan Müller úr Lübeck*



– Henda løtan má vera eitt serstakt upplivilsi hjá manning, starvsfólki og leiðslu í Smyril Line. Hetta er ein nýggj tíð, sum byrjar í norðuratlantiskari ferju- og ferðamannasigling sigur Heri Niclassen, stjóri í Ferðaráð Føroya og ein av veteranunum í føroyskari ferðavinnu sum heild. Hann hevur mong ár á baki í privatu ferðavinnuni, bæði hjá Smyril Line og Atlantsflog.

Hann vísir á, at hetta seinasta stigið hjá Smyril Line má sigast at vera triðja stigið í einum útviklingi, sum er 27 ára gamal. -Fyrst var tað Smyril, síðani Norrøna og nú nýggja Norrøna. Tað hevur verið ein støðug framgongd alla tíðina. Og hjá felagnum var bert eitt at gera, og tað var at útvega eitt størri skip, tí eftirspurningurin er vaksin so nógv. Vaksandi talið av ferðafólki ynskir eisini betri umstøður umborð. Verandi Norrøna er útslitin. Hetta verður tí eisini spennandi hjá okkum øðrum í føroyskari ferðavinnu. Heri Niclassen sipar til, at Ferðaráðið eisini vil vera partur av tí útviklingi, sum verður í kjalarvørrinum á nýggju Norrønu. - Okkara partur skal so ikki liggja eftir fyri at fáa hetta at ganga.

Nýggja Norrøna fer at blíva eitt týðandi lið í menningini av føroyskari ferðavinnu. Fyri at fáa ferðandi við skipinum fer Smyril Line eisini at leggja uppaftur størri orku í marknaðarføring. Tað kann so koma at gagna allari føroyskari ferðavinnu.

Stjórin í Ferðaráðnum heldur, at tað má vera ein undarlig men ikki minst góð kensla hjá teimum, sum løgdu lunnar undir táverandi Smyril í 1975. -Teir, sum vórðu við til at keypa Mortan Mols fyri 27 árum síðani, og sum eru við í dag, høvdu neyvan ímyndað sær tá, at man 27 ár eftir, at Smyril kom, skuldi sjóseta eitt so stórt skip sum ein beinleiðis avleiðing av tí, sum pionerarnir fóru í holt við tá. Tað má vera stuttligt í dag at vera pionerur í ferðamannasigling í Norðuratlantshavi og uppliva henda dag.

Heri Niclassen, sum hevur verið við til at leggja lunnar undir Smyril Line og byggja tað upp, heldur, at felagið var tvingað til at gera okkurt, tí tey ferðandi hava spurt eftir størri skipi og betri komfort. Hvussu fer at ganga fíggjarliga veldst um so nógv, eitt nú um hvussu gongur fíggjarliga í landinum. – Eg rokni við, at uppaftur fleiri føroyingar fara at brúka Norrønu, tá hon kemur í sigling. Nú er pláss fyri teimum. Nú fáa teir tað kamarið, sum teir hava ynskt sær. Heri Niclassen roknar við, at tann gamla tíðin fer at endurtaka seg, tá fólk fóru við skipi bæði um heystið og várarnar. Tey fyrstu árini verður ein ávís nýfikkingheit millum føroyingar. Men tann útlendski marknaðurin má røkjast sum ongantíð fyrr.



*– Nýggja Norröna fer at blíva eitt týðandi lið í menningini av føroyskari ferðavinnu, heldur Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráð Føroya*



# Nýggja Norrøna alstóran týdning fyri útflutningin

**At avgjørt varð at halda fram við Smyril Line heldur enn at gevast, nú tørvar var á einum nýggjum skipi, heldur ein av veteranunum í ferðavinnu og flutningi, Thomas Arabo, var eitt fyri Føroyar sera skilagott val. Bæði fyri ferðavinnuni og fyri útflutningin.**

NýTT SKIP
*Jan Müller*



– Nýggja Norrøna er avgjørt ein skilagóð og neyðug íløga fyri alt føroyska samfelagið. Ferðavinnan er eitt, men hon hevur kanska størsta týdning fyri okkara feskfiskaútflutning. Hetta heldur ein av veteranunum innan føroyskan skipaflutning, Thomas Arabo. Hann var hjástæddur, tá nýggja Norrøna fór av bakkastokki í týska býnum Lübeck leygardagin.

Thomas Arabo er ikki ein og hvør heldur, tá talan er um skipaflutning. Hann var stjóri í Strandferðsluni og ein av høvuðsstigtakarunum til at keypa Mortan Mols til uttanlandasigling í 1975. Thomas var eisini ein av heilunum aftanfyri tað flutningsmynsturið, sum tá tók seg upp og sum skuldi blíva avgerandi fyri útviklinginum víðari frá Smyrli til Norrønu og nú til nýggja Norrønu.

Nú hann eygleiðir nýggju Norrønu í havnini í Lübeck renna minni um 27 spennandi ár upp fyri hann. – Eg haldi tað var rætt og gott, at vit keyptu Mortan Mols á sinni, eins og tað er rætt og gott, at nýggj Norrøna nú verður smíðað sigur Thomas Arabo, sum heldur, at nýggja Norrøna fer at klára seg. – Tað eru professionell fólk, sum standa aftan fyri Smyril Line. Við sínum drúgvu royndum fer felagið eisini at megna uppgávuna, sum bæði er at flyta ferðafólk og fram. Thomas Arabo heldur sjálvur, at týdningurin, sum skipið fer at fáa fyri feskfiskaútflutningin eigur ikki at undirmetast. Við hesum vælaskipi ber til at fáa 1. floks fiskavørur úr Føroyum til meginlandið. Uppá fyrispurning um ikki hetta er ein uppgáva hjá øðrum skipafeløgum, sum burturav taka sær av vøruflutningi, sigur Thomas Arabo, at føroysk skipafeløg og her serstakliga Skipafelagið hava ikki megnað at liva upp til tær avbjóðingar, sum eitt nú feskfiskaflutningurin hevur sett. – Mínar royndir øll hesi 27 árini síðani vit fingu Smyril og fóru undir uttanlandssigling við eitt nú farmaflutningi fyri eygað hava verið tær, at eitt føroysk skipafeløg hava verið ov konservativ og hava tíanverri eisini roynt at leggja fótonglar fyri tí flutningi, sum grundarlag varð lagt til í 1975.

Thomas Arabo heldur eisini, at nýggja Norrøna kann skapa ferðavinnunu nógvar nýggjar møguleikar. Her hugsar hann bæði um at fáa fleiri fólk henda vegin men eisini at tjena pengar uppá at flyta ferðafólk millum meginlandið og Ísland. Aftrat hesum koma so tey mongu arbeiðsplássini, sum nýggja Norrøna fer at skapa.

Sjálvur hevur Thomas Arabo sitið í nevndini í Smyril Line í mong ár. Hann var við til at taka avgerðina um at halda fram við nýggjum skipi heldur enn at gevast og selja allar ognirnar. Tað var nettupp við mongu møguleikunum, sum Norrøna skapar, at teir í nevndini hildu tað vera rætt ikki at gevast men heldur at gera nýggjar íløgur. Thomas Arabo heldur tað vera í lagi og gott, at útlendskur kapitalur er við í projektinum, men hann heldur, at tað er avgerandi neyðugt, at meirilutin er á føroyskum hondum. – Eitt felag sum Smyril Line eins og Atlantsflok hevur stóran týdning fyri føroyska samleikan, tí eiga vit eisini sjálvi at eiga meirilutan.

Thomas Arabo heldur eisini, at vit eiga at takka politikarum sum Atla Dam og Finnboga Ísakson, sum við stuðuli frá eitt nú Jógvan Sundstein syrgdu fyri, at politisk undirtøka varð fyri at keypa Mortan Mols á sinni, sum jú var tað, ið legði lunnar undir ta verkætlan, sum nú er farin av bakkastokki í Lübeck. – Táverandi Mortan Mols kostaði umbygdur minni enn 30 mill. men tann íløgan kravdi eisini djarvar politikarar við visiónum. Løgtingsmenn vóru sera ivasamir, og var tað samankoblingin við uttanlandssigling, sum gjørdi, at tingið tók undir við at fáa nýggjan Smyril til suðuroyarsiglingina.

Thomas Arabo ásannar, at 750 mill. kr. er nógvur peningur, men hann heldur, at tað kundi neyvan gerast bíligari. At fólkini aftanfyri projektið hava so drúgvar royndir eisini heldur hann vera rættiliga avgerandi.



*Um 400 fólk vóru við til hátíðarhaldið í Lübeck leygardagin, tá nýggja Norröna fór av bakkastokki – av teimum um 100 úr Føroyum*



*Jóannes á Váli, fíggjarstjóri í Smyril Line, Jónas Hallgrimsson, nevndarlimur úr Íslandi, Klæmint Weihe, nevndarlimur, Óli Hammer, stjóri og Tórmóður Djurhuus, nenvdarformaður á skipasmiðjuni í Lübeck leygardagin*



*Tummas Arabo og konan vóru eisini við í Lübeck. Tummas Arabo var stjóri á Strandferðsluni, tá Smyril byrjaði uttanlandssiglingina í 1975. Hann hevur eisini í fleiri ár verið nevndarlimur í Smyril Line*